Álit

í

løgtingsmáli nr. 91/2020: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti (Ásetingarlógin) (Skattlig javnseting av persónum, sum fáa fólkapensjón, og áseting um persónar, sum eru 67 ár ella eldri, sum ikki fáa fólkapensjón, og sum áður hava fingið ein landsskattafrádrátt)

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Jørgen Niclasen, hevur lagt málið fram 25. februar 2021 og eftir 1. viðgerð 3. mars 2021, er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 8. mars 2021.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við landsstýrismannin í fíggjarmálum, Jørgen Niclasen.

Ein samd nevnd vil vísa á, at í sambandi við fyrireiking av løgtingsmáli nr. 45/2020 er, grundað á eina misskiljing, ein feilur komin inn í skiftisregluna (§ 3) í uppskotinum. Feilurin ber í sær, at:

- persónar, 67 ár ella eldri, sum ikki fáa fólkapensión og sum fram til 31. desember 2020 í staðin hava fingið ein landsskattafrádrátt, frá 1. januar 2021 at rokna, missa henda frádrátt.

- hækkaði frádrátturin í landsskattinum og kommunuskattinum hjá persónum, sum fáa fólkapensjón, bert er galdandi fyri persónar, sum fylla 67 ár 1. januar 2021 ella seinni.

Við at gera hesar lógarbroytingar fara persónar sum eru 67 ár ella eldri, sum ikki fáa fólkapensjón og sum fram til 31. desember 2020 í staðin hava fingið ein landsskattafrádrátt, framhaldandi at fáa henda frádrátt.

Eisini verður hækkaði frádrátturin í landsskattinum og kommunuskattinum hjá persónum, sum fáa fólkapensjón, galdandi fyri allar persónar sum fáa fólkapensjón.

Við hesum viðmerkingum tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Fíggjarnevndin, 11. mars 2021

Magnus Rasmussen formaður	Aksel V. Johannesen næstformaður	Jákup Mikkelsen
Bill Justinussen	Kristin Michelsen	Páll á Reynatúgvu
	Ruth Vang	